# Hjálparmaður gjørdist masl

**Glyvramaðurin Ólavur Gunnarsson hevði ongantíð verið til skips, tá hann í 2002 gjørdist hjálparmaður í maskinrúminum umborð á gomlu Norrønu. Í dag er hann maskinstjóri og hevur 30.000 HK og fleiri fólk undir sær. Í hesi samrøðu greiðir hann frá, hvussu hann endaði uppi á hægstu tindum í maskinrúminum umborð á føroyska stoltleikanum innan ferðamannasigling**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur vitjað í eftirlitsrúminum og í maskinrúminum umborð á Norrønu, og vit hava tosað við maskinstjóran og glyvramannin, Ólav Gunnarsson.

Maskinrúmið umborð á Norrønu er stórt og hjá einum, sum ikki hevur havt høvi at verið í maskinrúminum umborð á einum slíkum skipi áður, tykist tað rættiliga stórt.

Norrøna hevur fýra høvuðsmotorar av slagnum Caterpillar M.A.K 6M 43, sum eru 7.500 HK hvør. Allir fýra motorarnir eru eins, og soleiðis er maskinorkan tilsamans 30.000 HK.

Ólavur Gunnarsson sigur, at tveir motorar ganga inn á hvørt gearið, og soleiðis hevur skipið tveir akslar og tvær skrúvur.

Mesta ferð í góðum líkindum er 20-21 sjómíl um tíman og løtuna, vit vitjaðu í maskinrúminum, lá ferðin um góðar 17 míl.

- Hava vit góðar stundir, sigla við ikki við øllum motorunum í senn. Vit kunnu sigla við trimum motorum, tveimum ella bara einum, um tað skal vera. Tá skipið kemur í havn, ella tá ið loyst verður, eru allir motorarnir í gongd. Hetta er eisini av trygdarávum, um eitt hvørt skuldi borist á.

Maskinstjórin sigur, at tá full ferð er á øllum fýra høvuðsmotorunum, er nýtslan av tungolju heili 4 tons um tíman.

Aftrat teimum fýra høvuðsmotorunum hevur Norrøna tríggjar hjálpimotorar ella ljósmotorar, sum teir eisini vera róptir.

- Tá siglt verður, eru tað aksilgeneratorarnir, sum standa inn á gearið, ið syrgja fyri uppgávunum hjá ljósmotorunum, sum soleiðis standa stillir. Aksilgeneratorarnir taka kanska eina hálva míl av ferðini, men hinvegin spara vit olju, tá ljósmotorarnir ikki eru í gongd.

Ólavur sigur, at vanliga nýtslan av streymi umborð á Norrønu liggur um 1200 kWh, men bara aksilgeneratorarnir klára at framleiða nógv meira enn tað, og soleiðis eru teir ríkiliga stórir til nýtsluna umborð á skipinum.

- Eru líkindini vánalig, hava vit vanliga ljósmotorarnar koyrandi, og hetta er eisini av trygdarávum, leggur hann aftrat.

Maskinstjórin sigur, at umleið 2000 ymiskir alarmar liggja inn á telduskipanina í eftirlitsrúminum, og uppi á kamari sínum kann hann eisini fylgja við, um alt koyrir, sum tað skal.

- Skipanin stendur í fyrsta lagi til ymiskar komponentar í maskinrúminum, men hon sigur eisini frá, um ólag eitt nú er á luftventilatiónini umborð. Eru avvik í skipanunum, sum ikki eiga at vera, fara alarmar í gongd.

## Dugnalig fólk

Seinni í greinini fara vit at siga eitt sindur um leiðina hjá Ólavi - av Skála Skipasmiðju, har hann var í smiðjulæru, til hann fleiri ár seinni fyrst gjørdist hjálparmaður í maskinrúminum umborð á gomlu Norrønu og til seinast, men eftir lutfalsliga fáum árum, endaði á ovastu rók í maskinrúminum á okkara stoltleika innan ferðamannasigling.

Tað er út við eitt ár síðan, at glyvramaðurin gjørdist maskinstjóri umborð á Norrønu, og hann er sera væl nøgdur við tey fólk, hann hevur undir sær.

- Umframt maskinstjóran, hava vit ein 1. meistara og ein 2. meistara. Síðan hava vit tveir 3. meistarar, ein elektrikara og tríggjar maskinhjálparmenn ella assistentar, sum vit rópa teir. Tveir mans eru í apeteringini – ein, sum tekur sær av tí sanitera og ein "húsavørður". At enda hava vit ein málara sum málar, pussar og ger ymiskt fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði.

Maskinstjórin umborð á Norrønu er ikki beinleiðis vaktgangandi, men skal altíð vera tøkur. Soleiðis kunnu vit eisini siga, at hann er á vakt 24 tímar um samdøgnið.

- Eg siti altíð í eftirlitsrúminum við komu og fráferð, og tað gjørdi eg eisini, tá vit eitt nú sigldu inn eftir Bergensfjørðinum og úr aftur Bergen. Siglingin inn til Bergens tók tveir tímar, og síðan sigldu vit einar seks tímar innanskers úr Bergen á veg til Danmarkar. Meðan vit lógu við bryggju, slapst tú sjálvandi upp at fáa tær ein bita.

Vaktirnar hjá maskinfólkunum umborð á Norrønu eru annars skipaðar soleiðis, at 1. meistari hevur fyrrapartsvakt frá klokkan 08-12, 2. meistari tekur yvir og er á vakt frá klokkan 12-18, og síðan tekur 3. meistari vaktina frá klokkan 18-24. Nú eigur 2. meistari tørn aftur og er á vakt frá midnátt til klokkan 04, og síðan er 3. meistarin frá klokkan 04-08, tá 1. meistari aftur kemur á fyrrapartsvakt.

- Teir tríggir maskinhjálparmenninir ganga vakt saman við maskinmonnunum – ein við hvørjum manni, og tá vit hava tveir 3. meistarar, er annar ikki vaktgangandi í maskinrúminum, men hevur ekstern økir umborð á skipinum undir sær, eitt nú luftventilatón, ketil, hita-og kuldaskipanir.

Maskinstjórin sigur, at menninir í maskinrúminum arbeiða 11 tímar um samdøgnið, harav ein hálvur tími fer til skiftini við byrjan og enda av vaktunum.

- Eg haldi, at felagsstevið umborð á Norrønu er gott. Nógv samband og samstarv er millum maskinrúm og brúgv. Fólk draga somu línu, og hetta er neyðugt, um besta úrslitið skal spyrjast burtur úr.

## Fekk tvinnar kostir

Men hvør er so glyvramaðurin Ólavur Gunnarsson, og hvussu hevur leiðin hjá honum úr fólkaskúlanum og niður í maskinrúmið á Norrønu verið?

Ólavur er føddur 30. juni í 1964. Pápin var Gunnar Olsen. Hann sigldi sum stýrimaður við Havørnini og druknaði í Esbjerg 2. februar í 1968. Líkið varð funnið aftur, og Gunnar liggur jarðaður í føroyskari jørð.

- Mamma mín var Kitty Olsen. Hon doyði í hampiliga góðum árum í 1999. Vit eru tveir brøður. Beiggi mín er Ingolvur Gunnarsson, sum er lærari og er hálvt annað ár eldri enn eg.

Maskinstjórin sigur, at tá pápin doyði, høvdu foreldrini nýligt bygt hús, og tí noyddist mamman at arbeiða rættiliga nógv fyri at fáa tingini at hanga saman. Hon arbeiddi í fiski, og hon arbeiddi í handli. Í nøkur ár hevði hon eisini pylsuvogn innanfyri Glyvra Bio. Omman flutti inn til tey at búgva, tá pápin doyði, og Ólavur heldur fyri, at omman virkaði meira sum mamma – og mamman, sum arbeiddi so nógv úti, virkaði meira sum pápin í húsinum.

Ólavur heldur ikki, at hann og bróðirin Ingolvur manglaðu nakað, sum onnur børn høvdu ella kundu.

- Eg haldi, at vit høvdu júst somu møguleikar, sum onnur børn høvdu, leggur hann aftrat.

Hin 11. juni var Ólavur og vitjaði mammu sína á Glyvrum, sum hann so mangan hevði gjørt áður, eftir at hann var fluttur út.

- Júst hendan dagin kom mamma mín at vísa mær, at nú vóru húsini útgoldin. Hon hevði stríðst nógv, og nú var hennara lívsverk lokið. Tríggjar dagar seinni doyði hon, sigur Ólavur álvarasamur, nú vit sita og práta inni í stóra kamarinum hjá honum umborð á Norrønu.

Tá Ólavur í 2002 gjørdist hjálparmaður í maskinrúminum umborð á gomlu Norrønu, hevði hann ongantíð verið til skips áður.

- Eg hevði góðan hug til sjógvin, og tá eg varð liðugur við realskúlan í 1981, hevði eg líkasum fingið lyfti frá reiðaríinum Kenn á Glyvrum um at sleppa við farmaskipinum Norðlandiu. Men tá segði mamma mín nei. Ætlaði eg mær at sigla, so kundi tað vera seinni. Eg fekk tveir kostir í at velja – antin at fara á studentaskúla ella í læru.

Ólavur sigur, at hann slett ikki kendi mammu sína aftur í hesum, nú hon var vorðin so avgjørd. Tað plagdi ikki at vera hon. Seinni hevur hann hugsað,

